# Kjak



Jóannes Eidesgaard

## Vinnuhúsið átti at vitað betur

Fyrst Landsbankin og síðan Vinnuhúsið vísa á, at eingin politiskur vilji er til at gera nakað við almennu útreiðslurnar, tí eru tær vaksnar so nógv seinastu árini. Hetta samsvarar illa við dagliga tíðindaflutningin í føroysku fjølmiðlunum, sum fyri stóran part snúgva seg um sparingar og skerjingar á eldraøkinum, heilsuverkinum, útbúgvingarøkinum og øðrum týdningarmiklum almennum tænastum. Og hetta samsvarar illa við útsagnir bæði frá Landbankanum og Vinnuhúsinum um, at tað er rætt av tí almenna at halda hjólini í gongd í eini krepputíð.

Tá ein listamálari málar eina mynd, so er tað hann, sum einsamallur ger av, um myndin skal verða ljós ella døkk. Tað er einki at ivast í, hvørjar litir Marita Rasmussen, leiðari í Vinnuhúsinum hevði á sínum paletti, tá hon sendi tíðindaskriv út um seinastu lýsingina hjá Landsbankanum. Her skuldi alt málast so myrkt sum gjørligt. Ikki eitt pensilsstrok við ljósum litum, og so málaði hon eisini eina falska mynd av einum veruleika.

Vinnuhúsið vísir á, at rokningin nú verður send vinnulívinum. Hvørjar rokningar sipar Vinnuhúsið til? Mær vitandi verður føroyska vinnulívið ikki harðari skattað enn vinnulívið í okkara grannalondum, heldur tvørturímóti. Vinnuhúsið hevur allahelst heldur ikki fingið við, at føroyska vinnan í seinastuni hevur fingið tillutað 85.000 tons av makreli ókeypis frá Føroya fólki.

Um vit hyggja at almennu útreiðslugongdini, so ivist eg stórliga í, um árligi útreiðsluvøksturin hevði verið so stórur, um vit í staðin fyri eitt 10 ára skeið brúktu eitt 20 ára skeið aftur til kreppuna í Føroyum fyrst í 1990-árunum. Føroyska vælferðarsamfelagið var niðurpínt og illa fyri eftir búskaparkreppuna í 1990-árunum. Ein týðandi partur av útreiðsluvøkstrinum er tí farin til at dagføra og menna føroyska vælferðarsamfelagð eftir búskaparkreppuna, soleiðis at vit kunnu veita á leið somu vælverðartænastur sum í okkara grannalondum. Landsbankin tekur útgangsstøðið í einum metári í einum hákonjunkturi til eitt botnár í einum lágkonjunkturi

Størsti parturin av rakstrarútreiðslunum hjá landinum fara til lønir. Landsbankin vísir á, at lønarútgjaldingarnar í nevnda 10 ára skeiði eru hækkaðar við umleið einari milliard krónur. Veitingar til borgaran eru vaksnar við knøppum 700 milliónum krónum.

Eg fari eisini at loyva mær at ivast í, um Landsbankin og Vinnuhúsið høvdu viljað verið hesar útbyggingar fyriuttan, tí høvdu vit ikki gjørt tær, so hevði so nógv annað í samfelagnum sæð munandi verri út.

Seinastu árini hevur vøksturin í sáttmálalønunum hjá tí almenna verið eitt lítið vet minni enn vøksturin í sáttmálalønunum á privata abeiðsmarknaðinum. Tað er í hesum sambandi vert at viðmerkja, at lønarsáttmálarnir á privata arbeiðsmarknaðinum verða gjørdir fýra mánaðir áðrenn, lønarsáttmálarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum verða undirskrivaðir. Tí er tað privata vinnan, sum stýrir kostnaðargongdini her í landinum.

Eri annars púra samdur við Vinnuhúsinum um, at vit kunnu finna sparingar í almenna rakstrinum við at leggja smáar stovnar saman. Landið fíggjar uttan iva nógvar dupultfunktiónir. Eisini havi eg meira enn nakar annar peikað á, at vit mugu reformera samfelagsraksturin heldur enn at kuta útreiðlsur niður í meira ella minni í blindni. Annars er eitt tað størsta politiska takið í nýggjari tíð um at fara av bakkastokki, nevniliga pensjónsreformurin.

Vit skulu heldur ikki gloyma, at ein týdningarmikil orsøk til at raksturin hjá landskassanum ikki hongur saman, er, at vit hava ein ófíggjaðan niðurskurð av heildarveitingini á 366 mió. kr. frá 2002 at dragast við. Hetta svarar til meira enn helmingin av hallinum hjá landskassanum, sum verður mett til umleið 700 mió. kr. í ár. Ófíggjaði niðurskurðurin av heildarveitingini hevur kostað landskassanum meira enn 4 mia. kr. til dagin í dag.

Tá vit so heldur ikki megna at finna semjur um at taka tær mest uppløgdu inntøkurnar til felags raksturin av samfelagnum, so er ikki lætt at fáa javnvágina aftur. Men kanska skuldi Vinnuhúsið tikið aktivt lut í einum kjaki um at breiðka um inntøkugrundarlagið hjá tí almennn heldur enn at renna skríggjandi undan.

---



Bill Justinussen

## Nú er soðið tunt

*Teir skriva óført, samgongumenninir. Tað tykist, sum teir vænta val í næstum, og tí skriva teir fyri at sleppa at síggja sítt egna høvd, tá teir lata bløðini upp. Onkur hevur helst sagt teimum, at hetta er góð reklama. At seta høvdið í blaðið*

Men innihaldið er lítið gevandi. Nú um dagarnar hevur hin ídni greinaskrivarin Bjørn Kalsø eina grein, sum hann kallar “Vinnunevndarformaður leyp frá egnum áliti”. Eftir at hava lisið greinina, spurdi eg meg sjálvan, hvør boðskapurin í greinini var. Men eg fann onki svar. Tí má eg venda mær til Bjørn, sum so fær enn ein møguleika at seta sítt høvd í blaðið. Hvør er boðskapurin?

Fyri mær at síggja snýr greinin seg bara um vanliga almenna vitan. At vinnunevndarformaðurin leyp frá sínum áliti um fiskidagarnar, vita øll, sum bara fylgja eitt lítið sindur við. At samgongan fyrst var samd um eitt álit, fyri síðani at vera ósamd, er heldur ikki nakað nýtt; tað eru vit so von við. At formaðurin í mentanarnevndini var við í einum broytingaruppskoti, vita øll. At ilt er at meta um samstarvsevnini frameftir, sigur okkum bara, at Bjørn ikki dugir serliga væl at leggja 2 og 2 saman. Tí samstarvsevnini eru null, tað prógva farnu 6 árini. Sanniliga er soðið tunt í samgongusuppuni.

Góði Bjørn! Tú hevur nú sitið í samgongu síðani 2004. Hesa tíðina hevur samfelagið verið fyri slíkari vanstýring, sum neyvan er sæð áður. Tit tóku ræðið av eini samgongu, sum var farin undir at tillaga føroyska samfelagið til minkaðu inntøkurnar. Men tit hava ikki brúkt tykkara ræði til bøta um samfelagsbúskapin. Heldur hava tit brúkt tíðina til at klandrast, og ongin hevur talið á teimum politisku ósemjum, sum hesi árini hava eyðkent føroyskan politikk. Og tey skilagóðu uppskot, sum komin eru úr andstøðuni, hava tit brúkt alla orku til at afturvísa. Tú vart sjálvur formaður í vinnunevndini, tá uppskot Miðfloksins um at stuðla innflutningi av triðjalandstoski til virkingar á føroyskum flakavirkjum var til viðgerðar á Løgtingi. Nógv orka í vinnunevndini varð nýtt til at finna undanførslur, so sleppast kundi undan at taka undir við uppskotinum, hóast bæði vinna og arbeiðarafeløg tóku væl ímóti tí.

Mítt uppskot er, at tit leggja frá tykkum beinanvegin, so nýggjar kreftir sleppa framat. Landi okkara tørvar eina stjórn. Tað krevur góðan sjómansskap at sigla við stórum skipi í illveðri. Enn betri sjómansskapur krevst at stýra lítlari skútu gjøgnum illveðrið. Tí er hvør dagur uttan eina veruliga stjórn, ein dagur longur á vandaleið.